Hanna D. Andreassen

Fra: Astrid Reinert Øregaard
Sendt: Tuesday, October 31, 2023 09:34
Til: Hanna D. Andreassen
Emne: SV: Uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál til hoyringar - Hoyringarfreist 31. oktober 2023

Umhvørvismálaráðið hevur fingið til ummælis uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál. Umhvørvismálaráðið hevur hesa viðmerking:

Á síðu 5 í lógaruppskotinum stendur soleiðis:
"*Í øllum Føroyum er tað ein avbjóðing hjá tilflytarum at fáa arbeiðslív, útbúgving og familjulív at hanga saman. Tað er ein sannroynd, at 40 tíma arbeiðsvika darvar møguleikanum hjá einum næmingi at gjøgnumføra drúgvari málskeiði á upp til 20 tímar um vikuna*."

Umhvørvismálaráðið arbeiðir við eini stytting av arbeiðsvikuni til 37 tímar. Hóast arbeiðsvikan verður stytt til 37 tímar, verður tað helst ikki tann stóra broytingin í mun til at fáa arbeiðslív, útbúgving og familjulív at hanga saman hjá tilflytarum, sum skulu gjøgnumføra málskeið á upp til 20 tímar um vikuna. Helst skulu onnur tiltøk til fyri at bøta um hendan trupulleikan.

Vinarliga / Kind regards

Astrid Reinert Øregaard
Fulltrúi /Advisor
Mobile: +298 558072
astridr@umhvorvi.fo

Umhvørvismálaráðið
Ministry of Environment
Gongin 7, Postrúm 64 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 358700 / umhvorvi@umhvorvi.fo / www.umhvorvi.fo

Fra: Hanna D. Andreassen <hanna@bumr.fo>
Sendt: 10. oktober 2023 13:11
Til: Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Info útlendingastovan <info@utlendingastovan.fo>; industry@industry.fo; samtak@samtak.fo; staravsfelag@starvsfelag.fo; lararaf@lararafelag.fo; Føroya Pedagogfelag <pedagog@pedagogfelag.fo>; Undirvísing <undirvising@uvs.fo>; Nám <nam@nam.fo>; setur@setur.fo; kf@kf.fo; redcross@redcross.fo; kvoldskulin@torshavn.fo; kvungskuli@tvoroyri.fo
Cc: Elsa Østergaard <elsao@bumr.fo>; Helena Dam á Neystabø <HelenaN@bumr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál til hoyringar - Hoyringarfreist 31. oktober 2023
Prioritet: Høj

Góðu tit

Viðfest er uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál.

Orsøkin til, at lógaruppskotið verður lagt fram, er, at tørvur er á at skipa ein fakligan, námsfrøðiligan og løgfrøðiligan karm fyri undirvísing í føroyskum máli, mentan og samfelagviðurskiftumfyri borgarum í Føroyum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál.

Umráðandi er, at hetta lógarverk tryggjar samstarv við kommununar, og at samstarvið byggir á tað samstarv, sum hevur verið millum partarnar innan karmarnar á lóg um frítíðarundirvísing. Ein lógarkarmur, sum er fleksibul og skjótt kann laga undirvísingartilboðini til tørvin hjá borgarum og til ta til eina og hvørja tíð galdandi námsætlan, eins og til tann staðbundna tørvin.

Hoyringarfreistin er **31. oktober 2023.**

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skipar fyri kunnandi fundi um uppskotið miðskeiðis í hoyringartíðini, nærri kunning um hetta verður send út seinni.

Eru spurnignar, ber til at venda sær til Elsu Østergaard á tlf. 555004 ella Helenu Dam á Neystabø, tlf.555022.

Hoyringarpartar / FSA:

- *Kvøldskúlar, sum undirvísa í Føroyskum sum annaðmál*
- *Øll aðalráð*
- *Útlendingastovan*
- *Vinnuhúsinum*
- *Samtak*
- *Starvsfelagið*
- *Føroya Lærarafelag*
- *Pedagogfelagnum*
- *UVS*
- *NÁM*
- *Fróðskaparsetri*
- *Føroya Kommunufelag*
- *Reyði Krossur*

NB! Heitt verður vinarliga á Kommunufelagið um at víðarisenda henda teldupost til viðkomandi kvøldskúlar, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál.

Vinarliga / Kind regards

Hanna D. Andreassen
Stjórnarskrivari / Personal Secretary

Office: +298 306500
Mobile: +298 555060
Mail: hanna@bumr.fo

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

J. H. Schrøtersgøta 7
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands